

*Brandstøðin í Fuglafirði hevur fingið skrokk, og gongst sum ætlað sleppa fuglfirðingar at halda opið hús í mars*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Brandstøðin fingið hatt

*Hóast veðrið ikki hevur verið til vildar í vetur, so gongur arbeiði, at byggja nýggja brandstøð í Fuglafirði eftir ætlan, sigur býarverkfrøðingurin*

DÁNJAL HØJGAARD

Enn sær hon heldur tómlig út. Men nýggja brandstøðin í Fuglafirði verður liðug sum ætlað 1. mars.

Tað sigur Pætur Joensen, býarverkfrøðingur í Fuglafirði.

Brandstøðin varð reist í desember og nú verður arbeitt av øllum alvi, at inniloka støðina, so at hon kann verða tikin í nýtslu sum ætlað.

-Tað gongur sum tað skal. Vit rokna við, at verða liðug til 1. mars, sigur býarverkfrøðingurin.

**2,2 milliónir**

Gólvvíddin í nýggju brandstøðini í Fuglafirði verður tilsamans 250 fermetrar.

Í niðastu hædd verður garaga, har sløkkiliðsbilar og sjúkrabilur fara at standa.

Í ovaru hæddunum verða skrivstova, fundarhøli, køkur, wc og baðirúm.

Tað er Fuglafjarðar kommuna sum fíggjar nýggju Brandstøðina, ið er mett at kosta 2,2 milliónir krónur. Brandstøðin hevur í nøkur ár hildið til í einum bygningini, sum Fuglafjarðar kommuna eigur á keiøkinum.

LÆRUPLÁSS Í ELDING • LÆRUPLÁSS Í ELDING

# Lærlingur

## til Elding í Havn

Til handilin í Havn søkja vit eftir lærlingi at byrja beinanvegin.

Handilin er førandi innan sølu av hvítvørum, musikkinstrumentum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert læruplass í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi.

Tú ert ágrýtin og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS ella HH.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 25. januar 2000, og skal sendast til

Elding sp/f
SMS
100 Tórshavn

ELDING
Klaksvík • Saltangará • Tórshavn

## Skeið í byggijura

Um nóg nógv tekna seg skipa Arkitektafelag Føroya, Føroya Verkfrøðingafelag, Føroya Byggifrøðingafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag fyri skeiði í byggijura.

Skeiðið er ætlað handverksmeistarum, teknikarum, byggifrøðingum, verkfrøðingum, arkitektum, løgfrøðingum og banka- og sparikassafólkum, sum fást við bygging.

**Innihaldið á skeiðnum**
Á skeiðnum verður undirvíst í løgtingslógini um útbjóðing v.m. og í avtalugrundarlagnum millum byggiharrar og arbeiðstakarar.

Á skránni eru m.a. hesi evni:
- Avtalugrundarlag
- Trygdir og trygging
- Útinning av enterprisuni
- Gjaldskylda hjá Byggiharranum
- Tíðarfreistleingjan og seinkan
- Handan av arbeiðnum
- Manglar

**Undirvísari**
Undirvísari á skeiðnum verður Niels Sørensen frá Byggeriets Arbejdsgivere.

**Skeiðstaður og kostnaður**
Skeiðið verður á Hotel Vágum tann 10 og 11. februar 2000. Kostnaðurin fyri at luttaka er kr. 3.100,- fyri hvønn íroknað vistarhald.

**Tilmeldingarfreist & -stað**
Freistin at tekna seg til skeiðið er **25. januar 2000** í Vinnuhúsinum á tlf. 311864 ella á teldupostadressu: fag@industry.fo.



## Pedagogar
### til Dagstovnin í Fuglafirði

1. Søkt verður eftir pedagogi, 35 tíma viku, at byrja 01.02.2000, ella skjótast tilber. Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

2. Søkt verður eftir pedagogi, 30 tíma viku, at byrja 01.02.2000, ella skjótast tilber. Starvið er á stovu við 18 børnum í aldrinum 3-8 ár.

Lønin verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Um ikki nóg nógvir pedagogar eru til størvini, kunnu hjálparfólk verða sett fyribils í pedagogstørvini.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran á dagstovninum tlf. 444940.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 21. januar kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, 6. januar 2000
**Fuglafjarðar býráð**

## Hagstova Føroya

*Eitt starv er leyst at søkja á Hagstovu Føroya:*

### Fulltrúi

**Arbeiðsuppgávur**
Vit sóknast eftir einum búskaparfrøðingi sum fulltrúa til at arbeiða við tjóðarroknskapi og ymsu grundskipanunum til tjóðarroknskapin. Arbeiðið er í stóran mun í samstarvi við aðrar búskaparfrøðingar, fólk við teldukunnleika og skrivstovufólk á stovninum. Starvið kann annars umfata luttøku í ymsu uppgávunum á Hagstovuni.

**Førleikakrøv**
Hollur kunnleika til búðskaparfrøði er ein fortreyt, meðan evni til at fáast við teldur og programmering er ein fyrimunur, men ikki nøkur treyt.
Prógv krevst frá lærdum háskúla, cand. polit., cand. oecon. ella frá aðrari javntsettari útbúgving.

**Hagstovan kann bjóða**
Eitt áhugavert starv, sum gevur góðar møguleikar fyri at fáa innlit í føroyska búskapin, at fylgja við í gongdini í búskapinum og at arbeiða í einum mennandi fakligum umhvørvi.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingarfelagið.

Umsóknin skal vera á Hagstovuni í **seinasta lagi mánadagin tann 24. januar 2000.**
Hon skal sendast til Hagstovu Føroya, Box 2068, FR 165 Argir.

*Meira fæst at vita við at venda sær til stjóran á Hagstovuni á tel. 35 20 28, lok 250.*

*Hagstova Føroya er høvuðsmynduleiki fyri hagfrøðiligum virksemi í Føroyum, og er ein stovnur undir Fíggjastýrinum. Stovnurin hevur til uppgávu at gera hagtøl fyri øll týðandi samfelagsviðurskifti í Føroyum. Í løtuni starvast 13 fólk á stovninum, herav sjey við útbúgving frá hægri læristovni.*

## Hesar ognir verða lýstar til sølu

**Ídnaðarøki á Sandvíkarhjalla til sølu**
Við hesum verður eitt ídnaðarøki á Sandvíkarhjalla lýst til sølu. Økið er til víddar 3.727 $m^2$ og liggur væl fyri. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skrivstovu okkara.

**Ognir í Trongisvági**
Vegna Føroya Skiftirætt verða niðanfyri nevndu ognir lýstar til sølu:

1. Matr. nr. 51h, Trongisvági, sum er grundøki í trøðni á Húsgarðshaga, til støddar 1606 $m^2$ við ástandandi úthúsi.

2. Helvtin av matr. nr. 64, Trongisvági. Ognin er 4 gyllin í Líðarshaga við 10.227 $m^2$ innangarðs.

3. 1/9 at matr. nr. 69a, Trongisvági, ið er eitt grundøki til støddar 2.350 $m^2$ við ástandandi sethúsum.

Skiftirætturin tilskilar sær rætt til at velja millum tilboð, ið koma inn, og til einki at góðtaka. Nærri fæst at vita við at venda sær til skrivstovu okkara.

**Advokatskrivstovan, Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

**Bókhald Roknskapur Skattur**



Tosið við okkum um hóskandi loysn til júst tygara tørv

**Sandoyar Bókhaldsvirki**
FO 210 Sandur - Tlf. 361376 - fax 361309
e-mail: sand-bok@post.olivant.fo

**BORSTÁL**



- Grótborir
- Meitlar
- Borikrónur
- Kílar

**Vit útvega ALT innan boriútgerð**
25 ára royndir innan borstál og boriútgerð

**Kaj Andreasen Pf.**
Sandvíkarhjalli - Tlf. 315600 - Fax 318008

## Føroya Sjómansskúli
Maritime College

### Skeiðdeildin

Skeiðdeildin á Føroya Sjómansskúla skipar fyri eftirútbúgving av sjómonnum

Skeiðætlanin fyri 1. hálvár 2000

| | | |
|---|---|---|
| **ARPA** | | |
| Byrjar 7. mars | 4 dagar | kr. 7.000 |
| Byrjar 3. mai | 4 dagar | kr. 7.000 |
| **GOC (generelt skeið sum radiooperatørur)** | | |
| Byrjar 14. februar | 15 dagar | kr. 9.700 |
| **GMDSS-endurnýggjan** | | |
| Byrjar 31. januar | 5 dagar | kr. 5.500 |
| Byrjar 3. apríl | 5 dagar | kr. 5.500 |
| **Olju-, gass- og kem. 1. partur (Tanker Safety)** | | |
| Byrjar 7. februar | 5 dagar | kr. 4.200 |
| **Flutningur av vandamiklum evnum** | | |
| Byrjar 14. februar | 4 dagar | kr. 3.200 |
| **Arbeiðsumhvørvi (§16)** | | |
| Byrjar 13. mars | 3 dagar | kr. 4.000 |
| Byrjar 8. mai | 3 dagar | kr. 4.000 |
| **VHF-skeið** | | |
| Byrjar 14. februar | 5 kvøld | kr. 1.800 |

Øll skeiðini eru dagskeið, og undirvísingin fer fram á skúlanum kl. 8-15. Tó er VHF-skeiðið kvøldskeið. Skúlin hevur møguleika at skipa fyri øðrum skeiðum, umframt nevndu skeið til aðrar tíðir. Meiri fæst at vita við at seta seg í samband við skúlan.

Tilmelding á tel 31 1749 ella sg@farnav.fo

*Útbúgvingarnar á Føroya Sjómansskúla eru góðkendar av Føroya Landsstýri, søfartsstyrelsen og IMO*

Nóatún 2
Postboks 104
FO-110 Tórshavn
Føroyar
Tel +298 311749
Fax +298 318122
farnav@farnav.fo
www.farnav.fo